# CIT góðtekur bjargingarpakka

Nevndin í amerikanska fíggjarstovninum CIT góðkendi í gjár bjargingarpakkan upp á tríggjar milliardir dollarar. Hetta merkir, at felagið – eftir tingingar døgnið runt um vikuskiftið – sleppur undan at lata inn umsókn um konkurs. Amerikanski fíggjarheimurin hevur bíða í spenningi eftir, um ein loysn fekst á fíggjarligu trupulleikunum hjá felagnum, tí fór CIT av knóranum, kundi tað tikið aðrar fíggjarstovnar við sær í fallinum. Nú er felagnum tryggjað eina umstrukturering og hetta fer at veita kundunum hjá CIT nóg mikið av kapitali. Bjargingin verður tó ikki bílig og fer væntandi at kosta felagnum 11% í rentu, skrivar Financial Times.



